# Tvøradrongurin sum gjørdist kjøpinhavnari

Hann fór við Tjaldrinum til Danmarkar í 1929 bert 17 ára gamal. Tvøradrongurin Asbjørn Øster vildi hvørki vera fiskimaður ella barberur í heimbygdini. Lívsleið hansara gjørdist tí eisini ein heilt onnur sum handverkari og sølumaður og við mongum spennandi upplivingum langt og leingi heimanífrá



*Hann er føddur við navninum Asbjørn, men fluttur til Danmarkar fekk hann sjálvur broytt navnið til Esbjørn. Og hevur síðani verið nevndur Esbjørn*

SAMRØÐA

*Jan Müller*

Asbjørn Øster fylti 90 ár 17. apríl. Hann vitjaði í Føroyum nakað herfyri. Sosialurin hitti hann í heiminum í gomlu prentsmiðjuhúsunum hjá bróðrinum Arnold Øster, har bróðursonurin í dag býr.

Asbjørn vaks upp á Tvøroyri tíðliga í farnu øld. Hann gekk í skúla á Tvøroyri, men honum hóvaði einki matematikkina, og tí rakk skúlagongdin bert til 3. real. Realskúlin tá tók 5 ár. Ístaðin hevði hann fyrifallandi arbeiði sum at krevja inn pengar frá fólki eitt nú frá limunum í Klubbanum. Tað var í 1928.

Tað var ein ferð til Danmarkar á ungum aldri, sum skuldi verða avgerandi fyri, hvussu lagnan hjá hesum 17 ára gamla tvøradronginum fór at laga seg. FDF á Tvøroyri, Frivilligt Drengeforbund, har Asbjørn var limur, varð boðið til Slagelse. Tað var missioner Eliassen, ið tók sær av tí. Jákup Olsen skuldi vera leiðari á ferðini. Asbjørn greiðir frá:

## Við Tjaldrinum

- Vit fóru við Tjaldrinum 1. august. Tá floytað varð fyrstu ferð stóð eg á takinum á posthúsinum og tjøraði. Skuldi tjena teir síðstu pengarnar at hava við. Eg bleiv liðugur við takið og avroknaði. Tá eg so fór heim floytaði Tjaldrið fyri aðru ferð. Lukkuliga høvdu teir forroknað seg við lossingini, so eg náddi at koma umborð. Tá vóru nervar, men tað gav so nøkur eyka oyru at hava við í lummapengum. Ferðin til Danmarkar tók trý samdøgur.

Í Keypmannahavn gekk leiðin til skrivstovuna hjá FDF, ið skuldi syrgja fyri logi. Vit søgdu, at vit komu úr Føroyum. Maðurin gjørdist bilsin, tá hann sá okkum. Øll fólkini frá FDF vóru úti og ferðaðust. Einki varð heldur gjørt fyri at hýsa okkum.

Vit vóru 10 í tali, og kontórmaðurin fór at ringja runt. Endin varð, at vit skuldu búgva á Sankt Johannes Gæstehjem í Ryesgade. Men tað var ein ræðulig sjón, vit har møttu. Fult av fullum fólki, sjómenn úr øðrum londum, og har skuldu vit dreingir úr Føroyum sova. Tað var ikki serliga tespiligt. Fólkini skuldu í heilum kasta sær á vatninum. Hetta var ræðuligt fyri nakrar ungar dreingir. Jákup Olsen segði, at hann skuldi halda vakt, meðan vit svóvu, men eg segði honum, at har vildi eg ikki verða. Eg ætlaði mær til systur mína at gista.

Dagin eftir skuldu vit búgva á Hotel Frydenlund á Frederiksberg, og har búðu vit eina nátt. Dagin eftir fóru vit til Slagelse. Eg kom at búgva væl hjá privatfólki. Seinastu náttina vóru vit so í Keypmannahavn. Tá so Tjaldrið skuldi fara gekk Jákup Olsen kykur á keiini og bíðaði eftir mær. Tá lá eg í fasta svøvni og kom seint upp. Síðani avstað. Á veg til Tjaldrið møtti eg systur míni á Vesterbrogade. Hon helt við meg, at eg kundi spara mær, tí eg náddi ikki fram til tíðina kortini. Tá hevði Jákup Olsen sent boð eftir politiinum at leita eftir mær. Ein kona, Else Holm frá Sevmýru, hevði eina forrætning á Nørrebrúgv. Hon segði við Jákup, at teir tað sama kundu fara avstað, tí Asbjørn hevði sagt, at hann gott kundi blíva verðandi.

## Í frisørlæru

Hetta var so søgan um fyrstu og nær sagt seinastu ferðina hjá Asbirni til Danmarkar. Hann gjørdi tá av, at hann vildi vera verðandi í Danmark. - Pápi segði, at eg bara skuldi blíva niðri og fara í læru til frisør, tí har var eingin á Tvøroyri. - Tú kanst bara blíva fiskari í Føroyum segði hann. Tað var eisini vanligt, at fleiri rýmdu, tí teir egnaðu seg ikki at vera fiskimenn. Tað var ikki so nógv annað at fara til hjá einum ungum drongi.

Eg so gjørdi. Var hjá formanninum í Frisørforeiningini í tríggjar mánaðir, men tað var einki fyri meg, og eg gavst. Fekk so lærupláss sum elektrikari og kom á Lærlingaheimið at búgva. Har møtti eg John W. Thomsen, William Smith og Leif Mohr. Eg minnist tíðina á lærlingaheiminum serliga væl, tí har kom eg m.a. at kenna John Thomsen, sum var mær ein sera góður vinur. drekkamunn.

## Elektrikari

Asbjørn valdi at læra til elektrikara heldur enn til frisør.

Asbjørn hevur altíð verið egin og sín egni harri. Hann hevur ongantíð latið sær lynda, at onnur bestemmaðu yvir sær, og hetta kom eisini longu til sjóndar, tá hann varð tveittur millum "úlvarnar" í danska stórbýnum. Sjálvur greiðir hann soleiðis frá tíðini, tá hann var í læru og arbeiddi sum elektrikari.

- Eg arbeiddi hjá tveimum ymsum sveinum. Ein dagin eg hevði koyrt brillurnar í lumman kom arbeiðsgevari mín og



spurdi, hvar brillurnar vóru. Eg svaraði honum, at tær vóru í lummanum. Hann svaraði, at eg skuldi hava brillurnar á, tá eg arbeiddi fyri hann. - Tað bestemmi eg sjálvur svaraði eg honum aftur. - Nå, so kanst tú fara heim, helt hann argur fyri.

Eg fór alt fyri eitt til ein eygnalækna, ið segði, at eg nýttist ikki at hava brillur fyri at arbeiða sum elektrikari. Eg bað um at fáa tað skrivliga. Tá fór eg til dómaran á Frederiksberg. Og fakfelagið hevði einki ímóti, at eg tók eina sak uppá málið, tí lærumeistarin var ein búrhundur, sum fáur dámdi. Hann stjól altíð av tímalønini. Tá vit møttust í dómhúsinum skuldi eg montera ein køksfatning av porcelen uttan brillur. Tað gekk uppá stás, og sveinurin varð dømdur at gjalda mær 500 kr. Hetta var í 1932. Hin sveinurin eg hevði arbeitt fyri vildi fegin taka meg í læru. Soleiðis bleiv tvøramaðurin Asbjørn Øster útbúgvin elektrikari í danska høvuðstaðnum.

## Gjørdi smúkkur

Asbjørn arbeiddi sum elektrikari ymsastaðni í Keypmannahavn. Stóra ljósakrónufabrikkin Lyfa hevði lýsing og søkti eftir tveimum monnum. Hann søkti og fekk arbeiði har. Í 1943 fór hann at gera ljósakrúnur úr træ, tí einki metall var at fáa. Tann fyrsta hann gjørdi var við seks ljósum. Og soleiðis helt tað fram.

Hann fekk sær verkstað á Eysturbrúgv og fór undir at keypa gamalt silvur. Fór so undir at gera lutur úr tí, brosjur, oyraklips, ringar og armbond. Múrsteinsarmbond tey kalla við sjey rekkjum. Tað gekk fint. Hann kendi allar gullsmiðjurnar, sum jødarnir áttu. Teir vóru tá farnir til Lund í Svøríki, so hann tosaði við genturnar, sum fingu fatur í potageskeiðum, sum hann keypti til at smelta um. Tað gekk bara betri og betri. Brádliga kemur eitt tons av silvuri úr Ruslandi. Maðurin, ið innflutti tað, hevði ikki ráð til at taka tað heim og lat bankan gera tað. So var tað ein, ið spurdi, um hann ikki kundi keypa 100 kilo. Asbjørn kendi hann og seldi hann sær tað fyri 65 oyru grammið. Asbjørn gjørdi síðani hópin av silvursmúkkum.

Vit lata Asbjørn greiða frá:

- Eg fekk gjørt eina rúgvu av prøvum, sum eg pakkaði inn í silkipappír og kartouchepappír uttaná. Minnist at eg var í cottoncoat og fór til tann fínasta gullsmiðin á Frederiksberg. Hann handlaði mest við allar sjónleikararnar. Hann vildi síggja tað eg hevði gjørt og segði, at hetta var væl gjørt og spurdi, hvat eg skuldi hava fyri tað. Gev mær 12 av hvørjum av øllum var svarið. Hetta var ein fínur ordri. Síðani fór Asbjørn til aðrar at selja eisini, og eftirspurningurin bara vaks.

## Góður forrætningsmaður

Tey, sum hava kent Asbjørn, siga um hann, at hann altíð hevur verið ein góður og avhildin sølumaður og handverkari. Søgan um ljósakrúnurnar til Daels er dømi um tað. Hann seldi 100 ljósakrúnur til Daels Varehus. Teir vildu hava 10% í rabatt. Hann keypti so nakrar heilt bíligar fatningar og setti teir í ljósakrúnurnar, og so vóru tey 10% heima.

Asbjørn var fleiri ferðir í Føroyum og handlaði við Skilling og Niels Arge og Åge Dahl. Teir keyptu m.a. nógvar forlovilsisringar frá honum.

Í 1950 ringir ein maður frá København Skefabrik og spyr, um Asbjørn ikki kundi hugsað sær at ferðast kring Danmark og selja fyri teir og tí givist við sínum egna angrovirksemi. -Tað vildi eg hugsa um. So var nevndarfundur og eg fór at práta við teir. Teir spurdu, hvat eg skuldi hava fyri arbeiðið. Teir kundu bjóða mær 4% av tí eg seldi.

- Nei segði eg. Eg ferðist fyri egna rokning og eg skal hava fasta løn og síðani % av umsetninginum hjá fyritøkuni. Teir gløddu við. Eg vildi hava 50.000 fast og tað skuldi vera prístalsregulerað. Eg minnist stjórin sat har við protokollini. Hann var rættiliga súrur og segði ja, ja, ja..So var tað ein, sum segði 48.000 fast og 1% av umsetinginum. Eg segði nei og segði teimum, at teir skuldu halda seg til mítt uppskot. So spurdu teir, um eg ikki var til at tosa við. – Hr. Øster, skulu vit siga 49.000 og 1% av umsetinginum. Og soleiðis bleiv tað. Eg havi altíð sjálvur bestemmað. Hava aðrir ikki makkað rætt, so eri eg farin. Mong kendu Øster, eisini tí hann var ein góður og umhildin sølumaður.

So var tað, at Asbjørn teknaði eitt heilt nýtt bestikk, knív, gafful og skeiðir, sum fekk navnið Harlekin. Hetta bleiv ein stór succes. Tað bleiv ein tólvari, og fabrikkin kundi ikki levera alt, ið varð eftirspurt. So var einki annað at gera enn at fara í býin og leiga lokalir og keypa fleiri slípumaskinur. Settar vórðu upp seks slípimaskinur. Og ordarnir vórðu nógvir. Øster gjørdi bara arbeiði, sum gav pengar.

Tá Asbjørn fylti 69 í 1981, helt hann, at tíðin var komin at gevast.

Og nú hann lítur aftur um bak kann Asbjørn bara vera nøgdur.

- Eg havi havt tað gott. Havi havt eitt gott lív. Havi ongantíð verið arbeiðsleysur og havi altíð klárað meg sjálvan. Eg havi ongantíð hugsað um at fara heimaftur. Búð væl á Frederiksberg í 70 ár. Asbjørn varð giftur danskari kvinnu, og tey eiga tveir synir. Hóast hann hevur búð í Danmark í meira enn 70 ár av lívinum, so tosar hann føroyskt sum brent. Tað ger hann, tí hann hevur altíð roynt at tosa føroyskt.

## Foreldrini

Hvussu tá við familjuni í Føroyum spurdu vit Asbjørn. Jú pápin var Petur Olivur Øster. Østernavnið stavar úr Porkeri. Hann gjørdist 85 ár. Mamman var Karolina Hammer úr Hovi. Hon bleiv 75. Tey fingu 8 børn, fýra gentur og fýra dreingir og er bert Asbjørn á lívi. Ein av brøðrunum var tann kendi prentarin Arnold Øster í Havn.

Tað er við stoltleika, at Asbjørn minnist aftur á pápan. Hann kundi alt. Arbeiddi alt samdøgrið. Á turkihúsinum hjá Mortensen um náttina. Kom heim og lat seg í onnur klæði og fór síðani á bedingina. Asbjørn bar honum kaffi á turkihúsið um kvøldarnar og døgurða á bedingina um tvey tíðina.

Treiskni, sum hevur eyðkent alla lívsleiðina hjá Asbirni, var eisini nakað, sum eyðkendi pápan. Asbjørn minnist eitt nú hendingina, tá pápin keypti nakrar vørur niðri frá, mjøl og sukur.

- Eg bar honum tað. Oddamenninir á bedingini, Johan Mortensen og Tummas Thomsen, síggja meg bera pápa vøruna. Dagin eftir kemur Johan Mortensen og sigur við pápa: - Tygum keypa ikki tygara vørur her tygum tjena tygara pengar! Pápi svaraði, at hann keypti sínar vørur, har tað hóvaði sær. - Jamen, so kunnu tygum ikki arbeiða her. Pápi pakkaði saman og fór. Men tað gekk ikki long tíð, so var telefon til hansara. Teir vildu hava hann aftur á bedingina. - Teir kunnu renna meg eitt vist stað svaraði pápi teimum. Og dagin eftir hendi tað sama. Triðju ferð kom so ein sonur, Jens Mohr Mortensen. Pápi spurdi, hvussu tað bar til, at hann kom her! - Tú hevur ongantíð verið her segði pápi. Hann segði tá, at pápi mátti hjálpa til á bedingini. Teir høvdu brúk fyri honum. Og pápi svaraði, at eftirsum tað var hann, sum spurdi, so skuldi hann fara á bedingina aftur.

Petur Øster koyrdi bæði spølini á bedingini. Hann var útlærdur bygningstimbrari saman við Hans hjá Karolinu undir Heygnum á Tvøroyri. Petur bygdi sjálvur húsini. Hann sigldi eisini sum maskinmeistari.

- Pápi var so góður í hondunum. Manglaði onkur einar tuflur varð Petur eisini biðin um tað. Kanst tú gera mær eina kommodu! Soleiðis komu fólk oftani til hansara. Hann var ongantíð arbeiðsleysur. Tá hann varð fyltur 80 ár vildu teir hava hann aftur á bedingina.

Asbjørn minnist eisini, tá mamman plagdi at bíleggja frá Daels Varehus. Har var altíð okkurt vrøvl. Fór hon eftir pengum so bleiv spurt, hvat hon skuldi brúka teir til.

– Eg minnist, at hon bað meg fara. Eg spurdi, um eg virkuliga skuldi svara uppá, hvat pengarnir skuldu brúkast til. Nå ja eg spurdi bara var svarið. Og eg svaraði: - Ja, eg kann gott svara. Teir skulu brúkast til pakka frá Daels Varehus. So var ikki meira at tosa um tað.

Asbjørn fór til Danmarkar í 1929, bara 17 ára gamal. Hann kom ikki heimaftur at vitja fyrr enn í 38. Hann longdist ikki.

- Eg snakki við øll, eisini tey eg ikki kenni. Komi eisini væl út av tí við danir. Og teir danir, sum hava roynt at genera meg, hava ikki fingið ikki eitt bein til jørðina, sigur hesin 90 ára gamli tvøramaðurin, sum aftur vitjar á klettarnar.

## Fantastiskt!

Og hvussu kennist tað at koma heimaftur til eitt so broytt føðiland, og hvat heldur hesin spelkni og 90 ára gamli unglingin um Føroyar í dag!

- Tað er einki minni enn fantastiskt at koma heim og síggja, hvussu útviklingurin hevur verið. Serliga hetta við at uttan fyri øll hús er antin ein ella tveir bilar. Alt er so fantastiskt í Føroyum. Føroyingar eru við uppá tað heila og her er alt tipp topp. Her osar av virksemi, og øll finna uppá okkurt at gera. Her hendir nakað alla tíðina. Tað er bara at hyggja út gjøgnum vindeygað.

Asbjørn er ein maður við "sine meningers mod". Tað er komið til sjóndar alt hansara langa lív í arbeiðinum sum sølumaður. Hann dylur ikki fyri, at hann alt sítt lív hevur verið konservativur og vísir til, at hann jú eisini býr á Fredriksberg. Hann hevur so eisini sína meining um Føroyar og framtíðina.

– Eg haldi føroyingar skulu loysa beinanvegin frá Danmark. Føroyar nýtast ikki at hoyra til Danmark. Føroyar klára seg saktans einsamallar. Og koma ringar tíðir, sum vit kenna til, so er bara at spara. Fiskurin kemur jú aftur.




*Herfyri keypti Asbjørn sín 20. bil, ein Toyota Corola og at hann framvegis er tvøramaður og TB-ari sæst á nummarplátuni*



*Asbjørn nr. 2 frá høgru saman við góðum vinfólki. Við lið hansara hm. John W Thomsen og vm. Jacob Andreas Thomsen, báðir úr Skemmuni í Porkeri. Kvinnurnar eru eisini úr Skemmuni í Porkeri, Jusefina Thomsen (gift av Reyni) og Petra Thomsen (gift Wang). Myndin er úr Keypmannahavn frá umleið 1932*